


## Lyngbyspælarar høgt í metum

Fýra Seriu A-feløg, umframt FC Midtjylland og OB eru áhugaði í Mikkel Beckmann og Kim Aabech frá Lyngby. Mikkel Beckmann og Kim Aabech hava verið teir størstu profilarnir hjá Lyngby, har offensiva duoettin hevur staðið aftanfyri størsta partin av málunum hjá upprykkjarunum. Hetta hava fleiri italiensk feløg fingið eyguni upp fyri, og sambært Ekstra Bladet kunnu teir báðir leikararnir vera á veg vekk longu í vetrarsteðginum. Fýra Seriu A-feløg – Reggina, Livorno, Chievo og Udinese – skulu vera klár til at heinta Lyngby-profilarnar. Faktisk hevur tað verið so stórur eftirspurningur eftir Beckmann og Aabech, at Lyngby valdu at hvíla teir báðar um vikuskiftið, tá Tele2 Cup var í Brøndby Høllini. - Teir fyrispurningar, ið brádliga eru komnir, og hóvastákið og fokusið gjørdi, at vit valdu at hvíla teir báðar, greiður Ítróttarstjórin í Lyngby, Birger Jørgensen frá, fyri Ekstra Bladet. Tað eru ikki bert italiensk feløg, ið skulu vera áhugaði. FC Midtjylland og OB skulu eisini hava teir báðar ynskilistanum í flytingarvindeyganum.




# Nógv mintust Phil O´Donnell

DEYÐSFALL

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Tað var ein stórur skelkur fyri allar fótbóltsáhugaðar bretar, at liðskiparin hjá Motherwell brádliga doyði eftir hjartatilburð, tann 29. desember í 2007. Tað kom tó mest dátt við hjá konuni, Eileen og teirra fýra børnum. Viðhaldsfólkini hjá Motherwell valdu at minnast liðskiparan Phil O´Donnell á ein sera serstakan og vakran hátt. Teir bjóðaðu viðhaldsfólkum, ikki bara hjá Motherwell, men viðhaldsfólkum hjá bretskum feløgum yvirhøvur at leggja eina áminning, eitt flagg, eina troyggju, ella eitt turriklæði við økið eystanfyri Fir Park, sum er heimavøllurin hjá Motherwell FC. Á myndini sæst ein evarska lítil partur av øllum teimum lutunum, sum vóru lagdir út á økið. Har lógu lutir frá mongum ymiskum fótbóltsfeløgum. Eileen O´Donnell vitjaði økið, og var hon sera rørd! "Tað var hjartaskerandi at síggja eina ólukkuliga unga mammu, sum hevur mist mann sín, á ein so tragiskan hátt. Vit vóna, at vit hava kunnað troystað hana eitt sindur, tá hon sær, at lívið hjá Phil hevur nomið við so mong menniskju. Hann var ein legenda í Motherwell FC, og ein gentlemaður. Øll viðhaldsfólkini biðja fyri hansara familju!" segði ein av fyriskiparunum. Phil O´Donnell varð grivin 4. januar, í skotska býnum Hamilton. Bert tey nærmastu vóru til jarðarferðina.